# Fáa ikki arbeiði

Í Danmark hevur fíggjarkreppan gjørt, at nógvir nýklaktir akademikarar hava ilt við at finna nakað arbeiði. Jyllands-Posturin skrivar, at millum annað ganga meiri enn helmingurin av teimum, sum eru vorðnir lidnir sum elektroverkfrøðingar tað seinasta árið, framvegis arbeiðsleysir. Formaðurin í danska akademikarafelagnum, Erik Jylling, sigur við blaðið, at 28,4 prosent av øllum teimum, sum hava lokið akademiska útbúgving teir seinastu tólv mánaðirnar, hava ikki fingið nakað arbeiði. Hann stúrir fyri, at fleiri teirra fara helst at ganga arbeiðsleys leingi.



# Vænta avtalu um veðurlagið

ST-aðalskrivarin, Ban Ki-moon, var væl nøgdur, tá hann í nátt endaði veðurlagstoppfundin, sum hann skipaði fyri í ST-høvuðsborgini í New York í gjár. Á tíðindafundi í nátt segði aðalskrivarin, at hann hevur góða vón um at fáa eina veðurlagsavtalu á ráðstevnuni í Keypmannahavn í desember. Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, sum sat undir liðini á Ban Ki-moon á tíðindafundinum, var eisini bjartskygdur. Hann segði, at teir politisku leiðararnir á fundinum í New York høvdu víst leiðaraevni, men ásannaði, at enn er langt á mál.



*Fríðgerð og Rani í Líð hava stríðst fyri at fáa eitt svar frá Almannastovuni í yvir tríggjar mánaðir. Lítli Lýðar er sjúkur og má passast heima døgnið runt. At byrja við gekk tað sum skuldi, men uttan ávaring varð stuðulin skerdur. Nú trýstir so hart á fíggjarliga, at tá mánaðin er um at líða, hava tey ikki ráð at fáa mat á borðið.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

áðrenn fyrsta lønargjaldið er seinast í august, og umsóknarblaðið verður fylt út og viðgerðin fer í gongd.

Hon fær tá at vita, at tað ganga nakrir dagar áðrenn tað verður viðgjørt, men so verður tað aftur útskotið. Upp í fleiri ferðir fær hon at vita, at tað skuldi verða viðgjørt. Síðani varð ein endalig freist sett á, men í dag eru akkurát meir enn tvær vikur síðan hon skuldi fáa eitt endaligt svar, og hóast hon dagliga rykkir eftir einum svari, hevur hon enn ikki fingið tað. Nú kann hon heldur ikki fáa at vita nær hetta svarið kemur.

- Málið er farið í eina stjórnarnevnd, sum virkar sum eitt lukkað land. Eg havi spurt fleiri ferðir, hvønn eg kann tosa við har, uttan tó at fáa fatur á nøkrum sum helst, greiðir Fríðgerð frá.

- Eg hevði kunnað fingið fult starv frá byrjan av og hevði nokk klárað tað, sjálvt um tað var tungt, men í samráð við læknan valdu vit hesa loysnina. Í dag er sjálvandi einki fulltíðarstarv at fáa, og tí er tann møguleikin ikki longur opin, sigur Fríðgerð.

## Triðja skriðan er lopin

Meðan Fríðgerð hevur bíðað eftir einum svari frá Almannastovuni, um hon kann fáa hina helvtina afturgoldna, eru skjótt tvær lønarútgjaldingar farnar fram.

Hon fær hálva løn, og veit enn einki, um hon fær hin helvtina endurgoldna.

- Tá eg nú fái løn aftur, er hon vekk áðrenn hon yvirhøvur er komin. Tað er upp á ein máta nokkso eyðmýkjandi at muga viðurkenna, at vit eru fátæk. Vit hava ikki ráð at keypa mat, og nakar formur fyri luksus, so sum at bara keypa ein pakka av smákøkum, ella fara ein túr út við vinfólkunum, er yvirhøvur ikki hugsandi, vísir Fríðgerð á.

## Neyðin rekur tey av landinum

So hvørt sum dagarnir nú ganga, veksur trotið hjá Rana og Fríðgerð bara. Tey hava ikki longur fyri mat á borðið tá mánaðin fer at halla, og vónin um at fáa eitt skjótt svar frá Almannastovuni og vónin um hjálp, hvørvur í blánanum.

- Tað, sum er umráðandi nú, er bara at fáa eitt svar. Bara okkurt svar, sigur Fríðgerð.

Tey tosa saman eina løtu, og í eini viðmerking nevnir hon eisini, at tey hava hugsað um at fara av landinum, tí niðri halda tey at tey kunnu fáa betri hjálp enn her.

Sagt verður at har sum ein skriða er lopin er onnur væntandi, og kanska verður tað neyðin, ið rekur Rana og Fríðgerð av landinum.